LØGTINGIÐ

Høgni Hoydal
Aksel V. Johannesen
Ruth Vang
løgtingsmenn

Løgtingsformaðurin

**27. jan. 2022**
**j. nr. 1111-20210001**
(at tilskila í svari)

**Viðvíkjandi áheitan tykkara um setan av kanningarstjóra**
Við støði í áheitanini frá 15 tingmonnum, dagfest 21. okt. 2021, og ískoytisgrundgevingum frá tykkum trimum, dagfestar 10. januar í ár, hevur umsitingin í Løgtinginum latið løgtingsformanninum eitt tilmæli um setan av kanningarstjóra, sum er hjálagt hesum skrivi.

Í hesum tilmæli, mælir umsitingin undirritaða til, at ein kanningarstjóri verður settur at kanna tíðarskeiðið 2020-21 samsvarandi áheitan tykkara, men ikki tey bæði fyrru tíðarskeiðini 2010 og frameftir og 2018-19, tí at slík kanning ikki verður hildin at vera í tráð við ásetingina og endamálið við einari kanningarstjórakanning sambært § 38, stk. 2 í Stýrisskipanarlógini.

Sum løgtingsformaður havi eg gjørt av at fylgja niðurstøðuni og tilráðingini frá umsitingini, og skal tí boða tykkum frá, at eg havi tikið stig til bert at seta ein kanningarstjóra at kanna umsitingina hjá Jacobi Vestergaard, fyrrverandi landsstýrismanni í tíðarskeiðnum 2020-21.

Sum grundgeving fyri hesum verður víst til hjálagda tilmæli frá Løgtingsumsitingini.

Arbeiðið at finna kanningarstjóran er í gongd, og verður vónandi liðugt skjótt.

Um tit ikki ynskja, at hendan kanning verður sett í verk nú, tá talan bert verður um hetta seinasta tíðarskeiðið, verða tit biðin um at boða frá hesum beinanvegin.

Vinarliga

Jógvan á Lakjuni
løgtingsformaður

LOGTING.FO

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901